átrúnaður

Lagt til rættis: Snorri Brend *snorri@sosialurin.fo*



orðið



*Hesa vikuna:*

**John S. Myllhamar**

## Alt ber Guds merki

**"Og Guð leit at øllum, sum hann hevði gjørt, og sí, tað var sera gott".**

**1. Mósebók. 1, 31.**

Gjøgnum alla skapanarsøguna hoyra vit hendan tankan. Eftir at hvør nýggjur lutur er skapaður, sá Guð, at alt var gott, ið hann hevði gjørt. At enda stendur tað so, at alt samalt var sera gott.

Men tað er væl skiljandi, tí tað kann ikki koma annað enn gott frá Guðs hond. Hin góði Guð kann bara gera góðar lutir. Tað má natúrliga bera merki av honum, sum hevur gjørt tað.

Tað er løgnari, at tað yvirhøvur í tí heimi, sum Guð hevur skapað, er nakað, ið ikki er gott. Men av tí slagnum yður tað av. Heimurin er, hvat tí viðvíkur, farin av lagi, so at tað skal trúgv til fyri at síggja, at hann hevur nakað við Guð at gera. So nógv liggur í sori. Heimurin er vorðin spiltur av brúki. Tað er greitt, at Guð kann ikki hava skyldina í, at tað stendur so illa til við tí heimi, hann hevur skapað; tað má vera okkara skyld. Hetta kemst av, at vit eru sloppin at fonglast við lutirnar. Vit sluppu at vera harrar yvir lutunum, men gloymdu, at Guð sjálvur skuldi vera Harri yvir okkum. Tey, sum ikki vilja at nakar skal ráða yvir teimum, duga ikki at ráða yvir øðrum.

Skal tað verða betri við heiminum og við lutunum í okkara egna lívi, kann tað bara henda við, at Guð aftur gerst Harri yvir øllum, ið hann hevur skapað, og at vit gerast nóg lítil at vilja tæna honum við øllum tí, hann hevur litið okkum til.

# Byrja eina nýggja ungdómsmentan



*Tey ungu í Oasuni eru virkin. Nú ætla tey at byrja eina nýggja Jesus-mentan*

**Tey ungu í samkomuni Oasuni ætla ikki at ganga fyri einki á ólavsøku í ár. Tey skipa snøgt sagt fyri eini ungdómslegu við innihaldi og sum fer at vara alla ólavsøkuna**

**Hoyvík:** - Vit hava leingi droymt um, at ting skulu henda millum ungdómin í Føroyum. Okkara ynski er, at veruligt lív kemur í ungdómin, siga tveir av ungu monnunum í samkomuni, Trygvi Dam og Jóhannes Arge.

Út frá hesum hava teir, og fólk úr øðrum samkomum, í eina tíð arbeitt við ætlanini um at skipa fyri eini ungdómslegu á tjóðarhátíð okkara.

Tey vóna, at henda fyrsta summarlegan kann gerast byrjanin til eina nýggja tíð her á landi.

Her er kortini ikki talan um eina vanliga summarlegu, men eina legu har dentur verður lagdur á evangelisering.

Undirvíst verður um dagin í evangelisering, forbøn og í lovsangi, og síðani verður farið oman í býin at evangelisera við dansi, drama og øðrum fyri ólavsøkufólkinum.

Legan verður hildin í Badminton-høllini, og verður vónað at hetta kann gerast eitt afturvendandi tiltak.

### Nýtt ættarlið

Ynskið hjá teimum ungu í samkomuni Oasuni er at fáa samband við nógv fólk á Havnargøtum hesar dagarnar.

- Vit ynskja veruliga, at fólk skulu verða frelst, siga teir.

Ætlanin er at skipa soleiðis fyri, at mong ung koma saman í Badmintonhøllini um kvøldarnar, har skipað verður fyri einum stórum tiltaki við lovsangi, dansi og drama fyri ungdóm og við ungdómi.

Vónirnar við hesum tiltakinum er, at tað skal gerast byrjanin til eitt nýtt ungdómsættarlið við eini nýggjari Jesus-mentan.

- Vónandi er hetta eitt tiltak, ið rakar hjartað hjá nógvum fólki, tí vit hava brúk fyri øllum góðum kreftum hesar dagarnar, siga teir báðir, Trygvi og Jóhannes.

# Ung úr fríkirkjunum mest nøgd

**Prædikan hjá presti og tónleikurin undir gudstænastuni fellur í betri jørð hjá nógv fleiri ungum í donsku fríkirkjunum, enn í fólkakirkjuni**

**Kirkjur:** Donsku fríkirkjurnar eru munandi betri enn fólkjakirkjan at vekja íðinskap fyri gudstænastunum.

Hetta vísir ein nýggj kanning frá Center for Ungdomsstudier og Religionspædagogik um hvørji virði og holdningar tey 13-16 ára gomlu hava.

– Tey ungu í fríkirkjunum eru glaðari fyri teirra kirkju enn tey ungu í fólkakirkjuni, staðfestir Søren Østergaard, sum hevur staðið fyri kanningini.

90% av teimum ungu í fríkirkjunum halda, at tað er gott at syngja undir gudstænastuni, meðan samsvarandi tal í fólkakirkjuni einans er 70%. Níggju av tíggju ungum í fríkirkjunum eru eisini nøgd við tónleikin, meðan bert seks av tíggju í fólkakirkjuni eru tað. Her ynskir eisini helmingurin, at tónleikastílurin í fólkakirkjuni verður broyttur.

Hesin munurin er, sambært kanningarfólkunum at finna í tí, at fríkirkjurnar hava góðar royndir við at fáa nútíðar tónleikastílir við í gudstænasturnar.

Eitt er tónleikurin. Annað er prædikan, sum tey ungu í fríkirkjunum eru fegin um. Sjey av 10 siga, at tey kunnu brúka prædikuna hjá prestinum til nakað í gerandisdegnum, meðan bert helvtin av teimum ungu í fólkakirkjuni kunnu siga tað sama.

Ein teirra, ið hevur arbeitt við at skipa gudstænastur fyri tannáringar í Baptistkirkjuni í Aalborg, Dorthe Gjerrild sigur, at neyðugt er at skipa fyri felagsskapi millum tey ungu.

– Virksemið er ikki tað týdningarmesta. Eg trúgvi uppá felagsskapin, ikki eina góða skrá. Tí arbeiða vit nógv við at fáa tey ungu at føla seg vælkomnan í okkara kirkju, sigur hon við Kristelig Dagblad.

Hóast hetta vísir tað seg, at fríkirkjurnar og aðrir barna- og ungdómsfelagsskapir missa limir. Tað tykist trupult at halda fast við áhuga teirra yvir longri tíðarskeið.

## Kirkjukjallari til ymisk endamál

**Fuglafjørður:** 2. hvítusunnudag varð kjallarin í Fuglafjarðar kirkju tikin alment í nýtslu. Í hesum sambandi bjóðaði kirkjuráðið øllum kirkjufólkinum til døgurða á hesum staði. Kjallarin hevur staðið tómur síðani 1984, tá kirkjan varð vígd. Ætlanin er nú at brúka hann til ymisk endamál, millum annað konfirmantalestur. Arbeitt verður haraftrat við einum kirkjusavni við lutum frá gomlu kirkjuni. Arbeiðið hevur kostað umleið 4 mió krónur.

## Kunnu nú víga pør í Oasuni

**Hoyvík:** Í farna mánaði fekk samkoman myndugleika at skipa fyri brúðarvígslum. Hesin myndugleikin varð givin teimum úr danska kirkjumálaráðnum, og er tað ein av elstunum í samkomuni, Hendrik Olsen, sum hevur fingið hesa heimildina. Sagt varð samstundis frá ymiskum reglum, fyriskipanum og skyldum, sum samkoman hevur mótvegis teimum, sum ætla at lata seg víga her, m.a. at minst annar parturin skal hoyra til Oasuna.

## Stórar bólkar heldur enn gudstænastur

**Bergen:** Norkirken í næststørsta býnum í Noregi, fer nú at minka um talið á felags gudstænastum sínum. Ístaðin verður kirkjuliðið býtt upp í smærri felagsskapir við 30-50 fólkum í hvørjum. Endamálið er at røkka longur út. Orsøkin til hetta óvanliga stigið er, at kirkjan skal høvuðsumvælast komandi ár, og tí var neyðugt at finna einhvørja loysn. Hetta gav leiðsluni eitt høvi at hugsa nýtt, og hetta verður nú sett í verk.

## Nærkast til fyrstu summarlegurnar

**Heimamissiónin:** Skúlarnir hava ikki meiri enn fingið summarfrí, tá fyrstu summarlegurnar hjá Heimamissiónini byrja. Lagt verður til brots hósdagin 28. juni við tveimum legum - einari barnalegu í Leguhúsinum í Nesvík og einari í Sørvági. Íalt verður skipað fyri 12 legum í summar - seks barnalegum, trimum juniorlegum, eini familjulegu og tveimum ungdómslegum. Sløk 500 børn eru longu teknað til legurnar.

Sosialurin